Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 24.11.2022 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Katrin Kjartansdóttir<br>Magnus Skoralíð<br>Marjun Andreasardóttir<br>Rúni Justinussen<br>Marita Klein Joensen<br>Petur Súni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Hanna Jensen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 54/22 | 22/00321-2 | Fíggjarælan fyri 2023 | 2 |
| 55/22 | 22/00375-2 | Frágreiðing og tilmæli til mál 22/00375 - Eykajáttanir oktober 2022 | 4 |
| 56/22 | 22/00426-1 | 22/00426 - frágreiðing og tilmæli til mál - Uppskot um, at foreldur sleppa frá ansingargjaldið fyri desember 2022 | 6 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar**

## 54/22 Fíggjarælan fyri 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 26.09.2022 | 30/22 | 22/00321-2 |
| 2 Býráðið | 29.09.2022 | 44/22 | 22/00321-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 21.11.2022 | 39/22 | 22/00321-2 |
| 4 Býráðið | 24.11.2022 | 54/22 | 22/00321-2 |

**Málslýsing:**

Víst verður til fyriliggjandi uppskot/útrokningar til fíggjarætlan fyri 2023 (1.viðgerð).

**Ískoyti 21/11-22**

Sambært fyriliggjandi uppskoti, sum hevur verið til viðgerðar í øllum teimum føstu nevndunum og sum semja var um á felags fundi tann 18/11-22 verða høvuðstølini hesi:

| | |
|---|---|
| Samlaðar inntøkur | 126.984.000 |
| Rakstrarútreiðslur | 106.984.000 |
| Rentuútreiðslur | 1.170.000 |
| Avdráttir | 8.907.000 |
| Útr. til rentustuðul | 1.400.000 |
| Íløgur | 40.500.000 |

Skattaprosentið lækkar við 0,5 % til 20,5% og barnarfrádrátturin hækkar við 500 kr. til 8.500 kr.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

### Fíggjarnevnd 26. september 2022

Samtykt at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri 2023 fyri býráðið, og at málið verður beint í føstu nevndirnar til víðari viðgerð.

**Býráðið 29. september 2022**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevdini.

**Fíggjarnevnd 21. november 2022**
Mælt verður til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri 2023

**Býráðið 24. november 2022**
Einmælt samtykt at góðkenna fyrliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri 2023

## 55/22 Frágreiðing og tilmæli til mál 22/00375 - Eykajáttanir oktober 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 24.10.2022 | 37/22 | 22/00375-2 |
| 2 Býráðið | 27.10.2022 | 53/22 | 22/00375-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 21.11.2022 | 40/22 | 22/00375-2 |
| 4 Býráðið | 24.11.2022 | 55/22 | 22/00375-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi yvirlit yvir eykajáttanir. Talan eru um eykajáttan á íalt 2.515.000,00 kr. harav 350 t.kr er til rakstur og 2.165.000,00 kr. til løgur.<br><br>Peningurin kann takast av innistandandi, men av tí at ikki øll játtanin til nýggja dagstovnin við Gøtugjógv verður brúkt í inniverandi ári, kann peningur eisini takast av hesi konto. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Um tikið verður undir við tilmælinum hevur hetta ongar fíggjarligar avleiðingar, uttan tað at løgujáttanin til nýggja dagstovnin verður lækkað samsvarandi eykajáttanunum. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita eykajáttan samb. fyriliggjandi yvirliti, og at peningurin verður tikin av konto 3.26.11.511-10 (Løgujáttan til nýggja dagstovnin) |

**Fíggjarnevnd 24. oktober 2022**
Mælt verður til at veita eykajáttan samb. fyriliggjandi yvirliti og at peningur verður tikin av innistandandi.

**Býráðið 27. oktober 2022**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini

**Fíggjarnevnd 21. november 2022**
Mælt verður til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð

**Býráðið 24. november 2022**
Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð

## 56/22 22/00426 - frágreiðing og tilmæli til mál - Uppskot um, at foreldur sleppa frá ansingargjaldið fyri desember 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 17.11.2022 | 23/22 | 22/00426-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 21.11.2022 | 43/22 | 22/00426-1 |
| 3 Býráðið | 24.11.2022 | 56/22 | 22/00426-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Umhvørvis – og trivnaðarnevndin leggur fram uppskot um, at foreldur sleppa frá ansingargjaldinum fyri desember 2022. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Fyri vøggu- og barnagarðsbørn t.v.s. teimum, sum ganga á dagstovn í kommununi verður kostnaðurin kr. 263.000.<br>Um Frítíðarheimið og Skúlaspírnin eisini verða tikin við, er samlaði kostnaðurin áleið kr. 363.000 |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 17. november 2022**
Mælt verður til, at foreldur, sum eiga børn á dagstovni, frítíðarheimið og Skúlaspírnanum í kommununi, sleppa frá aningargjaldinum fyri desember 2022.

**Fíggjarnevnd 21. november 2022**
Fíggjarnevndin mælir frá at taka undir við tilmælinum hjá umhvørvis- og trivnaðarnevndini.

**Býráðið 24. november 2022**
Hanna Jensen setti fram uppskot um at útseta málið til støðutakan til komandi byráðsfund fyri at kanna málið nærri.

Fyrst bleiv atkvøtt um at útseta málið til komandi býráðsfund, og atkvøt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Per Martin Gregersen, Hjalti Dalheim, Magnus Skoralíð, Hanna Jensen, Katrin Kjartansdóttir, Petur Súni Jacobsen og Rúni Justinussen

**Atkvøður ímóti:**
Marita Klein Joensen og Marjun Andreasardóttir

fundurin lokin kl. 18.00

Per Martin Gregersen

Katrin Kjartansdóttir

Magnus Skoralíð

Marjun Andreasardóttir

Rúni Justinussen

Marita Klein Joensen

Petur Súni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Hanna Jensen